gult cyan magenta svart

Vestmenningur hevur ikki vunni› í 48 ár

10–mannafør: Hesa fer› eru vónirnar gó›ar í Vestmanna, har teir hava fingi› n‡ggjar árar, og har teir hava fingi› betri javnvág í manningina

N‡ggi Vestmenningur vann á nor›oyarstevnu, og n‡ggi Vestmenningur vann á sundalagsstevnuni. Ta› eigur at bera bo› um, at Vestmenningur seinnapartin í dag er favorittur at vinna í heimasjógvi. Men vestmenningar vilja avgjørt ikki kanna sær bitan, á›renn hann er svølgdur. Kappingin hevur higartil í ár veri› sera tøtt, og so er ta› hagtalssøgan, sum sigur, at Vestmenningur hevur ilt vi› at vinna í Vestmanna, sjálvt um hann er fremstur í nógvum av hinum kappingunum, og sjálvt um hann vinnur FM.

Fyrsta vestanstevnan í Vestmanna var hildin í 1952. Ta fer›ina var Vestmenningur fremstur. Sí›ani tá hevur kappró›ur veri› á Vestanstevnu í Vestmanna ellivu fer›ir, men ta› hevur ongantí› eydnast Vestmenninginum at vunni›. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at um ta› fer at eydnast í dag, so ver›ur ta› fyrstu fer› í 48 ár:

– Ta› er púra rætt, at ta› hevur ikki gingi› væl í Vestmanna. Vestmenningar minnast serliga væl, hvussu ta› gekk í 1984. Ta› ári› vann Vestmenningurin allar ró›rarnar uttan í Vestmana. Tá var› hann næstfremstur. Floksbáturin vann. Eg haldi, at ta› er einasti ró›urin, sum Floksbáturin hevur vunni›, minnist Bár›ur Nielsen, sum hevur ró› kapp í nógv ár, og sum nú er forma›ur í kappró›rardeildini hjá VÍF.

Ta› kom ein lítil stígur í hjá Vestmenninginum eftir sigurin á nor›oyarstevnu. Ta› var› nógv tosa› um, hví ta› ikki hilna›ist heilt væl, og so gjørdu teir av at gera onkrar broytingar:

– Gamli Vestmenningur lætti gronina upp frá, tá fer› var komin á hann. N‡ggi báturin reagerar øvugt. Hann sær út sum ein fullfermdur trolari, sum stendur á gronini. Tí hava teir flutt eitt sindur upp á fólki›, solei›is at onkur eitt sindur tyngri ma›ur er fluttur longri aftur, og onkur eitt sindur lættari er fluttur longri fram í bátinum.

Tá bátasmi›urin sá, hvussu høgt báturin fleyt, helt hann fyri, at ta› var ney›ugt at fáa eitt sindur longri árar til vega. Vestmenningar lurta›u eftir Sámali Hansen, sum teir hava kappast so nógv vi›, og teir halda, at n‡ggju árarnar, sum eru tíggju sentimetrar longri enn upprunaligu árarnar, gjørdu gó›a nyttu á Kollafir›i.

Allir somu umstø›ur

Tá vit spyrja Bár›ur Nielsen, um ta› er nøkur serstøk orsøk til, at ta› ikki hevur hilnast so væl hjá Vestmenninginum í Vestmanna, so vísir hann fyrst á, at møguleikin at vinna í heimasjógvi er bara til sta›ar fjór›a hvørt ár:

– Í 1984 lá Vestmenningurin tætt undir pirinum. Ta› rekur út vi› pirinum, og tí hev›i hann tær vánaligastu umstø›urnar.

Vil ta› siga, at umstø›urnar ikki eru eins hjá øllum, sum taka lut?

– Nú eru tær eins. Fyrsti kappró›urin, eftir at pirurin var komin, vísti, at máli› skal ver›a so eystarlaga á, sum ta› ber til. Ta› hava vit sí›ani roynt, og tí hava allir somu umstø›ur. Startmáli› er dygst uttanfyri Grønanes. Har er ein streymkantur tvørtur av málinum, men umstø›urnar eru eins hjá øllum. Hóast ta› í hesum vikuskiftinum er har›ur streymur, so eigur ta› ikki at bila, tí talan er, um eg so má siga, um besta har›a streymin á árinum.

Tyngir ta› vestmenningar, at ta› ver›ur vóna›, at teir skulu vinna á vestanstevnu í Vestmanna fyri fyrstu fer› í 48 ár?

– Allir teir, sum rógva vi›, hava veri› vi› í kappró›ri í nógv ár. Teir vita, hvat ta› sn‡r seg um, men ta› kemst ikki uttanum, at teir kanska eru eitt sindur spentari, enn teir eru á einari vanligari stevnu. Men nervarnir eru ikki fleiri, enn teir eru, tá talan er um ólavsøkukappró›ur.

Fleiri bátar

Í kappingini millum 10–mannaførini er ein gamal kenningur komin vi› aftur. Talan er um gamla Vestmenning, sum nú eitur Vestmannabáturin. Teir, sum hava manna› hann, hava allir ró› vi› og vunni› nógv vi› hesum bátinum í níti árunum:

– Vit hava vant millum lítí› og einki, men vit halda ta› vera stuttligt at taka lut, og so er ta› eisini hugaligari at síggja fleiri enn færri bátar at koma og skúmandi inneftir.

Kjølur úr Kollafir›i var› manna›ur eftir jóansøku. Á Kollafir›i vóru ábendingar um, at ta› gongur rætta vegin. Teir ætla sær at vinna á ólavsøku. Í dag fæst at vita, hvussu ta› gongur vi› at røkka tí málinum. N‡ggi Havnarbáturin hevur veri› næstfremstur í øllum f‡ra kappingunum. Teir vilja fegnir vinna, og bæ›i teir og Nólsoyingurin eiga at hava gó›ar møguleikar.

Eysturoyingurin var aftastur í Kollafir›i. Onkur hevur – í skemti sjálvandi! – tiki› til, at gamli Vestmenningur ella Vestmannabáturin luttekur hesa fer› fyri at tryggja, at Eysturoyingurin ikki skal enda aftastur eina fer› afturat. Ivaleyst eigur ta› at vera meiri í sigursvandu FM manningini frá í fjør og í fyrraári› enn aftasta pláss›.

Su›uroyingurin var saknaa›ur í Kollafir›i, og hann er heldur ikki vi› hesa fer›. Vágbingurin var ikki vi› í Kollafir›i. Hann hevur boa› frá luttøku í Vestmanna, og hesa fer› ver›ur ta› n‡ggi Vágbingurin, sum fer at taka lut. Ta› hava veri› trupulleikar vi› bátinum, og ta› hev›i fyrr í ár vi› sær, at vágbingar ró›u í Sumbinginum. Fyri tveimum vikum sí›ani fingu teir n‡ggja Vágbingin su›uraftur, og í dag fara teir fyri fyrstu fer› at royna seg í honum.

jh



Kappró›ur hevur veri› alla vikuna

Kappró›ur: Øll 10–mannaførini uttan eitt hava vant í Vestmanna, og nógvir a›rir bátar hava eisini roynt seg, har teir skulu kappast í dag

Ta› hevur so at siga veri› kappró›ur í Vestmanna hvønn einasta dag í hesi vikuni. FM kappró›ur ver›ur á vestanstevnu í Vestmanna seinnapartin í dag, og manningarnar hava fyrireika› seg, sum tær ongantí› á›ur hava gjørt:

– Ta› hevur veri› stak hugaligt og forkunnugt. Øll 10–mannaførini uttan Vágbingur hava vant í Vestmanna, og nógvir av hinum bátunum hava eisini veri› her og vant. T.d. hava allir gentubátarnir í Vágum veri› her, og ta› er ikki langt frá, at allir bátarnir hjá Havnar Ró›rarfelag hava veri› í Vestmanna og vant.

Bár›ur Nielsen er forma›ur í kappró›rardeildini hjá VÍF:

– Vestmenningar ganga høgt upp í kappró›urin, og sjálvsagt hava nógv fylgt vi›, tá fremmandu bátarnir hava vant. Ta› fylgja altí› nógv vi›, tá bátarnir her í Vestmanna venja, og nú hevur bori› til at sammeta ymsu bátarnar, t.d. hvussu teir flóta, hvussu áralagi› er, og hvussu ró›rarlagi› er.

Hava bátarnir so at siga spælt vinardyst ímóti hvørjum ø›rum?

– 10–mannafør venja ikki móti 10–mannaførum. Kanska taka teir nøkur spurttøk móti hvørjum ø›rum, men ta› ver›ur ikki meiri enn ta›. Ta› er komi› fyri, at 10–mannafør og 8–mannafør ella onkur onnur bátastødd hava kappró›, men sjálvandi lúra manningarnar eftir hvørji a›rari.

Gó› líkindi

Vestanstevnan skiftir ímillum tær tríggjar stóru bygdirnar í Vágum og Vestmanna. Stevnan var sí›st í Vestmanna í 1996. Tá vóru kappró›rarlíkindini vánalig. Onkrar kappró›rarmanningar hildu, at ta› var ó›amannaverk at rógva, og at ró›urin átti at havt veri› útsettur til sunnudagin. Ta› hildu fyrireikarnir ikki, og allir ró›rarnir vór›u fingnir frá hondini.

Í hesi vikuni hevur sjógvurin ligi› sum ein sveiti, og um ve›urvánirnar fara at gerast veruleiki, so ver›a kappró›rarlíkindini gó› í dag:

– Vit rokna avgjørt vi›, at ta› ver›ur dey›aslætt. Ta› er ta› t‡dningarmesta, tá talan er um kappró›ur. Vit vóna eisini, at ta› ver›ut turt. Ta› ger ta› hugaligari bæ›i hjá teimum, sum rógva, og serliga hjá teimum, sum hyggja at, heldur Bár›ur Nielsen, sum í mong ár ró›i vi› Vestmenninginum.

Í dag fara flest bátar at luttaka í kappingini millum 5–mannafør vi› gentum. Har er bátatali› fimtan. Sambært fyrireikarunum átti ta› ikki at veri› nakar trupulleiki:

– Fasti starturin er 180 metrar langur. Í honum eru seytjan startringar. Ta› vil siga, at ta› eru gó›ir tíggju metrar til hvønn bátin. Tá teir rógva eitt túsund metrar, átti ta› ikki at veri› nakar trupulleiki at funni› hvør sítt stavnhald. Hetta plaga manningarnar at avtala sínámillum, tá tær liggja á startmálinum. Men ta› skal st‡rast neyvt. 10–mannaførini eru umlei› tveir metrar, har tey eru brei›ast, og árarnar stinga einar tveir metrar út um stokkin. Ta› vil siga, at ta› eru einir tríggir metrar ímillum bátarnar, sta›festir Bár›ur Nielsen.

Fleiri favorittar

Eftir sundalagsstevnuna, sum var í Kollafir›i, sta›festu vit, at í fleiri kappingum ber ta› ikki til at ímynda sær a›rar FM vinnararnir, enn teir bátarnar, sum higartil hava vunni› allar ró›rarnar.

Dreingirnir umbor› á Tjaldrinum ver›a uttan iva fyrstu FM vinnararnir í ár. Higartil hava teir vunni› allar ró›rarnar sannførandi. Og teir vinna FM í dag, um teir fáa tvey stig. Men sjálvandi ætla teir sær at ver›a fremstir og harvi› at fáa sjey stig.

Kvinnurnar umbor› á Jarnbardi, genturnar umbor› á Frúnni og menninir umbor› á Argjabátinum hava eisini vunni› allar tær f‡ra kappingarnar, sum hava veri› higartil, og allar hesar manningarnar eru stórfavorittar at vinna í Vestmanna og harvi› longu undan ólavsøkuró›rinum at ogna sær FM heiti›.

Ta› er bara í tveimum bátastøddum, at ta› er spenningur um FM heiti›. Í kappingini millum 6–mannafør vi› monnum og í kappingini millum 10–mannaførini er ta› tætt, og tískil er eingin upplagdur favorittur at vinna í dag. 6–mannaførini Hvessingur og Strálan skeita nógv eftir hvørjum ø›rum, og Hósvíkingur roynir at hanga uppi í. Í kappingini millum 10–mannaførini hava Nólsoyingurin og Vestmenningurin vunni› tveir ró›rar í part.

jh

Ta› ver›ur spennandi at síggja, hvørjir bátar fara at draga ta› longsta strá›i› í kappró›rinum á Vestanstevnu í Vestmanna leygardagin

Vestanstevna

Bátarnir fara at liggja í hesi nummarrø› 15. juli

5-mannafør dreingir
1 Junkarin
2. Báran
3. Spógvin
4. Drekin
5. Havfrúgvin
6. Tjaldri›
7. Kollur
8. Royndin Frí›a
9. Síli›
10. Blikur

6-mannafør kvinnur
1. Sólmundur
2. Riddarin
3. Fuglfir›ingur
4. Hvessingur
5. Jarnbardur
6. Gongurálvur
7. Lómur
8. Páll Fangi

5-mannafør gentur
1. Royndin Frí›a
2. Junkarin
3. Bylgjan
4. Súlan
5. Síli› 1 gult
6. Havfrúgvin
7. Drekin 1 gult
8. Hvassi 1 gult
9. Frúgvin 1 gult
10. Tjaldri›
11. Ørnin 1 gult
12. Beinta 1 gult
13. Blikur
14. Spógvin
15. Dúgvan

6-mannafør menn
1. Sólmundur
2. Hósvíkingur
1 gult
3. Hvessingur
4. Strálan 1 gult
5. Gongurálvur
6. Kollfir›ingur
1 gult

8-mannafør
1. Knørrur
2. Sjóriddarin
3. Kvívíkingur
4. Hei›abáturin
5. Gullbrandur
1 gult
6. Toftabáturin
7. Argjabáturin
8. Nevi› Rey›a
9. Húsavíkingur
1 gult
10. Oyndri
11. Mi›vingur
1 gult
12. Víkarbáturin
13. Ørvur

10-mannafør
1. Vágbingur
2. Kjølur
3. Havnarbáturin
1 gult
4. Vestmenningur
5. Nólsoyingur
6. Eysturoyingur
7. Vestmannabáturin

Súkklukapping

Statoil
- kring Føroyar

Bláa fórara-troyggjan

Vinnarin av Statoil kring Føroyar 2000 verður heiðraður á Statoil-støðini í Gundadali, har býráðsformaðurin handar heiðursmerki.

Flúgvitalerkar til børnini

Okkurt verður til áskoðarar, m.a. fáa børnini ókeypis Statoil-flúgvitalerkar.

Á øllum etapunum bjóðar Statoil sandwich, kaffi, te o.a. til luttakararnar.

Fylgið við súkklukappingini á www.tsf.fo

Tíðarætlan

Mikudagur 19. juli - Prologue
Klaksvík (uml. 2,7 km.)
Start/Mál við Statoil-støðina
Byrjar kl. 18.15 - endar uml. kl. 19.00

Hósdagur 20. juli - 1. Etapa
Norðskáli - Leirvík -
Saltangará (uml. 106 km.)
Mál við Statoil-støðina í Saltangará
Byrjar kl. 13.30 - endar uml. kl. 16.15

Fríggjadagur 21. juli - 2. Etapa
Sandur
(Einkultstartur) runt Sandsvatn uml. 25 km.)
Mál við Statoil-støðina
Byrjar kl. 15.30 - endar uml. kl. 16.45

Leygardagur 22. juli - 3. Etapa
Drelnes - Sumba - Vágur (uml. 56 km.)
Mál við Statoil-støðina í Vági
Byrjar kl. 13.00 - endar uml. kl. 14.30

Sunnudagur 23. juli - 4. Etapa
Tjørnuvík - Vestmanna
- Tórshavn (uml. 110 km.)
Mál við Statoil-støðina í Gundadali
Byrjar kl. 14.00 - endar uml. kl. 17.00

Eftir hvørja etapu fáa nr. 1, 2 og 3 blómur, og fórarin letur seg í ta bláu fórara-troyggjuna.

STATOIL
- kring Føroyar

pætur & pætur • 320870